

# Eivør útseld í Wien

**700 fólk hava ognað sær atgongumerki til konsert hjá Eivør í Wien**

MENTAN
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Í dag fór Eivør Pálsdóttir til Eysturríkis, har hon skal hava tríggjar konsertir saman við Bill Bourne. Fyrsta konsertin verður hóskvøldið kl. 19.30 í Mozarthøllini í Konserthúsinum í Wien, sum tekur 700 fólk. Konsertin er ein liður í einum verkætlan, har dugnaligur ungdómur úr ymsum oyggjasamfeløgum fær høvi at vísa síni kynstur. Konsertin er útseld.

Tann næsta konsertin verður á Porgy & Bess í Wien fríggjakvøldið kl. 20, og triðja konsertin verður á Treibhaus í Innsbruck mánakvøldið kl. 20.

Týsdagin 24. januar seta Eivør og Bill kósina ímóti Glasgow, har tey mikudagin og hósdagin halda konsertir á kenda Skotska festivalinum Celtic Connection.

Í gjár sang Eivør í Norðurlandahúsinum á 25 ára jubileumskonsertini hjá Yggdrasil.

# Útspillingin ikki avleiðingar í Sjálvstýrisflokkinum

**Kári P. Højgaard vil ikki svara beinleiðis uppá, um heimasíðan hjá Jón Ellendersen skal fáa avleiðingar fyri hann innanfloks í Sjálvstýrisflokkinum**

KJAK
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Nógv kjak var í seinastu viku um tali- og skrivifrælsi í kjalarvørrinum av myndunum hjá Ole Wich, har hann m.a. samantvinnar Merkið og orðið »homoFObia«.

Eisini varð ein heimasíða latin upp, har Ole Wich sum persónur varð sera ógvusliga hartaður og niðraður og samanborin við fleiri óhugnaligar persónsmenskur og fyribrigdi úr heimssøguni, m.a. Mao og Auschwitz.



*Kári P. Højgaard sær ikki mun á tí, Ole Wick og Jón Ellendersen hava gjørt*

Maðurin, sum stendur aftan fyri hesa heimasíðuna, er Jón Ellendersen, og hann var til seinasta løgtingsval uppstillaður fyri Sjálvstýrisflokkin. Harafturat eru innlegg frá honum eisini at síggja á heimasíðu floksins.

Kári P. Højgaard, tinglimur og formaður Sjálvstýrisfloksins, vil tó ikki gera stórvegis viðmerkingar, um heimasíðan hjá Jón Ellendersen skal fáa avleiðingar fyri hann.

- Nú eru so nógv farin úr Sjálvsstýrisflokkinum, at nú kunnu ikki so nógv vera eftir, svaraði Kári P. Højgaard skemtandi, tá Sosialurin spurdi hann, um møguligar sanktiónir kundu koma upp á tal.

Kári P. Højgaard, sigur, at sjálvur metir hann kjakið í sein-astuni hava verið ótrúliga langt úti í heila tikið, sum hann orðar seg, og kallar samstundis kjakið sera einvíst og heldur stóra slagsíðu vera í orðaskiftinum uttan at fara nærri inn á, hvat hetta merkir.

- Málið er skúmað upp, og orðaskiftið er uttan proportiónir, og hetta hevur fylt alt ov nógv. Eg taki undir við hvørgum av teimum, sigur tinglimur Sjálvstýrisfloksins, tá hann verður spurdur, um hann metir mun vera á tí, sum Ole Wich og Jón Ellendersen hava gjørt. Kári P. Højgaard leggur tó afturat, at hann metir Merkið vera heilagt fyri føroyingar og sipar til krossin í Merkinum.

- Tað er altíð óheppið, tá eitt kjak fer av sporinum, og í hesum førinum er tað farið sporinum í báðum førum, sigur Kári P. Hø-j-gaard.

Tað er sostatt ikki greitt, um heimasíðan hjá Jón Ellendersen fer at fáa avleiðingar fyri hann í partapolitiskum høpi.

# Fimtan ára gamal tikin av løgregluni

**Nógv fólk var í býnum í Havn hetta vikuskiftið, men av Politistøðini verður tó ikki boðað frá stórvegis tíðindum um, at fólk skulu hava verið í hornatøkum.**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Tó er tað meira meira enn so komið fyri, at løgreglan hevur skrivað sær okkurt niður í sínar rapportir hesar seinastu næturnar.

Vikuskiftið byrjaði annars við, at tað var veðrið, sum ikki skikkaði sær serliga væl. Nógvastaðni var vindurin hvassur, og takplátur vórðu rivnar av húsum í Suðuroy og Klaksvík.

Leygarmorgunin stutt fyri klokkan fýra varð ein persónur tikin fyri rúsdrekkakoyring í Havn, og klokkan hálvgum fimm vóru aftur boð eftir yvirvøldini, tá ein maður gjørdi seg inn á ein hýruvogn. Maðurin er skuldsettur og kann vænta sær eitt brævfrá fútanum.

Hesa somu náttina var eisini boðað frá harðskapi, sum kostaði einum eina tonn. Talan var helst um tveir mans, sum klandraðust um eina gentu.

Harafturat varð ein brútur brotin við Verkstaðið Vón, sum saman við Frímerkjadeildini tykist at vera vorðið eitt slag av tilhaldsstaði hjá fleiri ungum um næturnar.

Í leygarkvøldið varð ein maður, sum einki koyrikort hevur, av tí tað er frádømt, tikin fyri at koyra ávirkaður. Klokkan hálvgum seks sunnumorgunin varð aftur ein maður tikin fyri at koyra fullur.

Harafturat varð ein fimtan ára gamal drongur, sum júst hevði keypt sær bil, tikin í fyri sjálvur at koyra hann, og tað er ikki nakað, sum løgreglan sær ofta, verður sagt av Politistøðini í Havn.




## Flogternur og flogtænarar til Atlantic Airways

Talan er um eitt spennandi og krevjandi arbeiði, har tú varðar av trygdini og tænastuni umborð.

**Starvið**
Felagið leggur stóran dent á, at ferðafólkini fáa eina góða og persónliga tænastu. Tað er tín uppgáva at fáa okkara kundar at kenna seg væl umborð, at hava ábyrgd av trygdini hjá ferðafólkunum og at meta um ynski og tørv teirra.

Tú skalt rokna við at arbeiða skeivar tíðir, onkuntíð uttanlands, ofta undir tíðartrýsti og við strongum arbeiðskrøvum. Tú dugir fyrstuhjálp og megnar at handfara hættisligar støður.

Umframt at tosa føroyskt skalt tú kunna samskifta á onkrum skandinaviskum máli og enskum.

Loftferðslumyndugleikarnir SLV krevja, at tú ert fylt/ur 20 ár, hevur góða hoyrn og góð eygu, umframt eina lýtaleysa revsiváttan. Harafturat krevst, at tú dugir at svimja og gjøgnumførir eitt skeið hjá Atlantic Airways. Heilsukanning fer fram hjá SLV-góðkendum floglækna, áðrenn loyvisbræv til flúgving verður givið.

**Persónligir eginleikar**
Vit rokna við, at tú ert kropsliga og sálarliga væl fyri. Tú mást hava eitt ljóst sinnalag, vera ágrýtin og bera teg róliga at í strongdari støðu. Vit leggja eisini stóran dent á samstarvseginleikar, trúðskap og reiðiligheit.

Ljóðar hetta sum tú, kanst tú innan 23. januar 2006 senda eina skrivliga umsókn við mynd til Atlantic Airways, 380 Sørvágur, att. Bergtóra Nielsen.

Fyrispurningar kunnu setast Bergtóru Nielsen á tlf 21 32 91 ella e-mail bergtora@atlantic.fo

www.sansir.fo

ATLANTIC AIRWAYS

www.flyfaroe.com